

*Ólavsøkukabarettin er aftur á skránni í ár, og lova leikararnir áskoðarunum eina hamrandi stuttliga og feita kabarett*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Hamrandi stuttlig og feit kabarett

**Vónirnar hjá leikarunum til ólavsøkukabarettina eru góðar. Tey lova áskoðarunum eina hamrandi stuttliga og feita kabarett við nógvum stuttligum og góðum sketsjum**

ÓLAVSØKA
*Ingrid Bjarnastein*

Ólavsøkan nærkast í stórum, og tann so vælkenda og vælumtókta ólavsøkukabarettin er aftur á skránni í ár sum undanfarin ár.

Teir fimm leikararnir Ronni Poulsen, Nicolaj Falck, Hanna Flóvinsdóttir, Kornelius "Blisand" Joensen og Eyðfinnur Stensen lova fólki eitt gott grin um tey leita sær niðan í Sjónleikarahúsið okkurt av ólavsøkukvøldunum.

Seinastu dagarnar hevur verið vant frá morgni til myrkurs, og nú er alt við at vera klárt.

– Vit hava verið í sving í eini 12 dagar, og vit kunnu lova áskoðarunum eina hamrandi stuttliga og feita kabarett, siga teir fimm leikararnir.

Hesar 12 dagarnar hava tey vant, funnið búnar, skrivað sketsjur, sett saman og alt annað, ið hoyrir til fyrireikingarnar av eini slíkari kabarett.

– Grin verður gjørt burturúr nógvum kendum persónum, sum hava gjørt okkurt býtt seinasta árið. Vit eru ikki bangin fyri at gera nakran firtnan, tí fólk eiga at vita, at tá tey koma til kabarett, so eiga tey ikki at taka tað, sum sagt verður, so tungt. Men tá ein til dømis er politikkari, so eigur ein at vita, at vandin fyri at gjøldur verður gjørt burturúr einum er størri enn um ein var ein vanligur persónur, greiða "de 5" frá.

Tey siga eisini, at tað kanska ikki ger so nógv, um tey gera ein persón firtnan, tá tey kunnu fáa 100 onnur at flenna.

## Frumframførsla leygardagin

Leygardagin klokkan 19.00 verður frumframførslan í Sjónleikarahúsinum. Teir fimm leikararnir vilja tó ikki avdúka ov nógv áðrenn stóra kvøldið.

– Tobbi, boppur, boppur, boppur... vit gera eitt sindur gjøldur burturúr list, vit brúka eitt kent luftslag, og ja, hetta man vera tað, sum vit vilja avdúka áðrenn kabarettin fer í gongd.

Eisini lova tey áskoðarunum ein rættan hvøkk, so blóðtrýstið skal vera í lagið, um tú ætlar tær til kabarett. Og, leggja leikararnir afturat: "Man má ikki verða for sartur um man ætlar sær at hyggja!".

– Kabarettin fevnir vítt í ár. Vit hava fingið nógv evnir við, og tí verður hon fjølbroytt. Havnin er væl umboðað, men tað eru tey smærru støðini sanniliga eisini.

Nógv gott fólk hevur verið við til at hjálpa við kabarettini vilja tey vísa á, og nevna tveir persónar: Jákup Veyhe og Gutta Winther. Og eru leikararnir eisini sera væl nøgdir við tónleikararnar og tónleikin.

So um tú vilt hava ein góðan látur á ólavsøku, er at leita niðan í Sjónleikarahúsið, tí har lova Ronni, Nicolaj, Kornelius, Hanna og Eyðfinnur at undirhalda tær eina løtu.

Samrøða við tónleikararnar er at lesa aðrastaðni í blaðnum.





**Reykjavík**

Atlantic Airways flýgur teg beinleiðis til Reykjavíkar. Ein lítil, men livandi býur, sum er merktur av, at hann liggur miðskeiðis millum Amerika og evropeiska meginlandið.

**Prísur úr**
**2.700,-** (3 nætur
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**Oslo**

Oslo er bæði margfullur og fullur av mótsetningum. Ein høvuðsstaður við altjóða dámi og kortini heilt ørðvísi enn aðrir høvuðsstaðir. Her er okkurt til okkum øll.

**Prísur úr**
**3.981,-** (3 nætur)
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**London**

London er millióna-býurin, har ongum nýtist at keða seg. Býurin er eitt mentanarligt Mekka, víðagitin fyri síni leikhús, konserthøllir og vælumtóktu pubbirnar.

**Prísur úr**
**4.231,-** 4 nætur)
Íroknað er: flogferð fram/aftur, hotel og ferðaavgjald.

**Sí onnur góð tilboð í "Út í Heim"**
Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Kom og dansa, kæri skattur mín…

**- Alt mítt lív havi eg gingið á møti og kenni tí kensluna av felagsskapi, tá ið felagssangur verður sungin. Men felagssangurin á ólavsøku og føroyski dansurin beint eftir, er nakað heilt serstakt, sum eg ongantíð havi upplivað áður**

**Soleiðis sigur ein lesari sunnanfjørðs, sum vendi sær til Sosialin í vikuni**

ÓLAVSØKA
*Vilmund Jacobsen*

Ólavsøkukvøld á midnátt verður felagssangur á Vaglinum, og tá ið sangurin er liðugur, hevur verið vanligt seinastu árini at kvøða "Ormin langa". Tað er Petur Olivur í Hoyvík – ella Gimpe – sum skipar, og er veðrið gott, taka fleiri túsund fólk saman hendur. Hetta er ein hugnalig og kanska hjartanemandi løta, sum hugtekur fólk - og ikki minst tey útlendsku ferðafólk, sum vitja land okkara um ólavsøkutíð.

Í vikuni ringdi ein lesari sunnanfjørð til Sosialin og ynskti at sleppa at greiða frá, hvussu hon fyrstu ferð upplivdi felagssangin og føroyska dansin á Vaglinum á ólavsøku.

## Serstakt upplivilsi

– Eg stóð mitt á Vaglinum, tá ið felagssangurin rungaði. Rundan um var tætt av fólki, og eg kendi meg varda av einum livandi garði. Tey søgdu, at har vóru fleiri túsund fólk; børn og vaksin, kvinnur og menn, gentur og dreingir. Onkustaðni hoyrdist útlendskt mál og nakrir normenn, ið fegnir vildu syngja við, bóðu um hjálp at finna sangir í heftinum, hvørja ferð ein nýggjur sangur byrjaði.

Kvinnan, sum ikki ynskir at verða navngivin, tí navnið er óviðkomandi, sigur, at alt lívið hevur hon gingið á møti og kennir hon tí kensluna av felagsskapi, tá ið felagssangur verður sungin.

– Men hetta var nakað heilt serstakt, sum eg ongantíð áður havi upplivað.

Her vóru fólk samlaði av øllum slag – fólk við ymiskum lívsákoðanum og lívslagnum. Øll sungu vit sama lag og somu orð. Kenslan av felagsskapi var intens. Eg kendi tað, sum vit vórðu vit øll knýtt saman – ja, eg kendi eina gleði um at verða fødd í Føroyum og at hoyra heima her.

Ein av sangunum, sum setti sín serliga dám á midnáttarløtuna, heldur hon var sangurin "Kom og dansa, hjartans kæri skattur mín"

– Hesin sangurin, sum mær dámar so væl, verður altíð sungin hesa løtu á ólavsøku. Tárini veltust fram í eygunum, og tankarnir fóru til tann, mær longdist eftir. Allastaðni rundan um meg sóust forelskaði pør, og tað gjørdi ikki longsulin minni.

## Eitt livandi hav av fólki

Hon sigur, at tá ið felagssangurin var liðugur, og tann føroyski dansurin byrjaði, fór hon niðan undir Tinghúsið, tí har er útsýnið so avbera gott.

– Fólkið stóð so tætt, at tað tók mær eina góða løtu at vinna meg gjøgnum mannamúgvuna. Eg stillaði meg upp á lagaða grótgarðin fyri at síggja betur. So nógv fólk havi eg ongantíð í lívinum sæð samlaði áður. Áarvegurin, Vaglið, Tinghúsvøllurin, Tinghúsvegurin og Niels Finsensgøta – allastaðni út í hvønn krók stóðu fólk. Í mikrofonini hoyrdu vit Gimpa við fastari rødd skipa Ormin Langa.

Og kvinnan heldur fram at greiða frá sínum upplivilsi:

– Komin uppá garðin at standa, sá eg eina sjón, eg ongantíð í lívinum fari at gloyma; eitt livandi hav av fólki, sum vaggaðu aftur og fram, sum dansurin gekk. Tað var, sum varð eg lyft upp frá, borin av mannarøddum sum kvóðu; monnum og kvinnum í føroyskum búnum, sum fluttu seg aftur og fram og aftur og fram. So harmoniskt og so friðarligt; eingin gangur ella bardagi – bert ein kvøðandi mannamúgva, ið tóku hvønn annan undir armin, slógu ring og í felagsskapi bóru eina aldargamla mentan víðari til komandi ættarlið.

At enda sigur kvinnan, at føroyski dansurin, sum fyri henni altíð hevði verið tungur og keðiligur, fekk eftir hesa løtuna á Vaglinum eina heilt aðra dimensjón.

Vit kunnu skoyta uppí, at aftur í ár verður felagssangur og føroyskur dansur á Vaglinum á midnátt ólavsøkukvøld.

Og enn einaferð verður tað fasta røddin hjá Gimpa, sum slóðar fyri…



*Eitt livandi hav av fólki, sum vagga aftur og fram, sum dansurin gongur*
*– Eg kendi meg lyfta upp frá og borna av mannarøddum sum kvóðu; monnum og kvinnum í føroyskum búnum, sum fluttu seg aftur og fram og aftur og fram*

# Hetlendingar skifta pelagiska flotan út

**Hetlendsku reiðaríini hava stóran íløguhug í løtuni. Stóru skipini, "Altaire", "Adenia" og "Antarctic", verða í næstum skift út við nýggj skip.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hugurin hjá hetlendskum reiðaríum at gera íløgur í skip er stórur í løtuni.

Sambært hetlendskum bløðum, verður skipið "Altaire", sum ikki er ókent í føroyskari fiskivinnu, skift út við ein 76 metur langan nýbygning, sum skal lasta 2600 tons av fiski.

Skipið verður projekterað av felagnum, Skipsteknik í Ålesund. Skrokkur og yvirbygningur verða sveisað saman í Turkalandi, og síðan verður skipið bygt liðugt á Solstrand Skipasmiðjuni.

Nýggi "Altaire" skal latast eigarunum um eitt ár.

Eitt annað skip í Hetlandi, "Adenia", skal eisini skiftast út við eitt nýtt skip, sum verður 61 metrar langt. Hetta skipið verður eisini sveisað saman í Turkalandi og verður latið eigarunum í endanum av komandi ári.

Triðja skipið, sum skal skiftast út í Hetlandi, er "Antarctic".

Við hesum verður meginparturin av hetlendska flotanum, sum fiskar sild, makrel og svartkjaft, skiftur út innan ár 2004.

# Skotar og írar halda seg hava prógv fyri, at Føroyar dumpa laks inn í ES

**Ein sakførari í Brússell, sum arbeiðir við dumpingmálum, sigur, at tað ringasta fyri Føroyar og Chili hevði verið, um ES bara hugdi at tí, sum hendi seinna hálvár í fjør**

LAKSAVINNA
*Vilmund Jacobsen*

– Eg kann ikki vátta, at vit fara at kanna føroysku og chilensku laksavinnuna fyri alt árið 2001.

Soleiðis sigur ein týdningarmikil kelda innan ES, sum norsk bløð hava tosað við.

Sum skilst, eru so nógvir føroyskir og chilenskir laksaútflytarar í kikaranum hjá ES fyri at hava dumpað laks inn á ES-marknaðin, at ES helst fer at velja nakrar burtur úr í sínum kanningararbeiði.

– Fyrsta stigið er, at vit fáa upplýsingar um laksaframleiðslu og laksaútflutning frá fleiri útflytarum og alarum í Føroyum og Chili fyri triðja og fjórða fjórðingsár í fjør. Tá ið tað er gjørt, er næsta stigið at tosa við myndugleikar og feløg hjá alarum í hesum londum, so vit kunnu velja út nakrar útflytarar og alarar, sum skulu kannast. Kanningarnar fara møguliga at snúgva seg um alt árið 2001, sigur ES-keldan.

Sambært norskum bløðum, kann tað vera ein fyrimunur fyri Føroyar og Chili, um ES tekur alt árið 2001 við í sína gransking, tí í fyrru helvt av árinum vóru laksaprísirnir nógv hægri enn í seinna hálvári.

Ein sakførari í Brússell, sum arbeiðir við dumpingmálum, sigur, at tað ringasta fyri Føroyar og Chili hevði verið, um ES bara hugdi at tí, sum hendi seinna hálvár í fjør.

## Halda seg hava prógv

Tað eru serliga skotskir og írskir alarar, sum leggja Føroyar og Chili undir at dumpa laks inn á ES-marknaðin. Teir halda, at laksur verður seldur á ES-marknaðinum fyri prísir, sum eru lægri enn "heimamarknaðarprísurin" í Føroyum og Chili. Tí vilja teir hava ES at kanna, um hetta er so, samstundis sum teir halda seg hava prógv fyri hesum.

Tað, sum ES nú skal kanna, er, um føroyskir og chilenskir laksaalarar og útflytarar hava skatt alararnar í ES við dumpingprísum.

Skotskir og írskir alarar siga, at tað, teir vilja, er, at øll triðjalond verða viðfarin eins í ES.

Noreg hevur eisini í fleiri ár ligið undir hóttanini hjá ES um, at felagsskapurin fer at leggja eyka toll á norskan laks.

# Russar á gomlum gøtum

**Russar vilja byggja upp ein skipaflota til fiskiskap eftir makrelstyrju, sum skal føra teimum 185.000 tons til lands í ár 2010.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Russar fyrireika seg nú til at byggja upp ein skipaflota, sum skal fiska makrelstyrju við nót og línu.

Sambært Fishing News International er í fyrsta lagi ætlanin at byggja fimm skip til hesa veiði. Av hesum skulu trý fiska við ringnót og tvey við línu.

Russar hava áður havt ein hampiligan skipaflota, sum fiskaði makrelstyrju í russiskum sjógvi og í altjóða sjógvi í Atlantshavinum og Kyrrahavinum.

## Framtíðarvónir

Sum skilst, vórðu hesi skip rikin við munandi halli. Tí vórðu tey antin umbygd til aðra veiði ella høgd upp, tá ið fiskivinnan í landinum varð privatiserað eftir, at Sovjetsamveldið datt sundur.

Nú vóna russar, at teir kunnu byggja upp ein skipaflota, sum kann geva teimum 185.000 tons av makrelstyrju í ár 2010.